# Sjálvandi kann ES-kommiserurin ikki vátta úrslit av samráðingum ið ikki eru byrjaðar

EDMUND JOENSEN,
fólkatings- og løgtingsmaður



Helst er tað bert Sjónvarp Føroya, ið roknar við, at ein ES-nevndarlimur yvir fyri fjølmiðlunum fer at vátta ella avsanna nakað sum helst um sínar metingar av einum úrsliti av møguligum samráðingum, sum ikki eru byrjaðar

Sjónvarpið hjá Kringvarpinum hevði í Degi og Viku hóskvøldið hesa høvuðsyvirskrivt: "Edmund Joensen, fólkatingsmaður, vísti til lyfti frá ES-nevndaliminum, Olli Rehn, tá hann í morgun legði fram lagaligan ES-politikk, men Olli Rehn vil ikki kennnast við nøkur lyfti".

Vanliga vandi eg mær sera væl um orðini, og tann, sum lurtaði væl eftir tí, eg havi sagt um hetta mál, veit, at eg havi talað um nakrar greiðar ábendingar, ið ES-nevndarlimurin Olli Rehn er komin við. Hetta sama havi eg skrivað í tíðindaskrivinum, sum er sent út um sama mál.

Tað er púra rætt, at Edmund Joensen ikki hevur fingið nøkur LYFTI úr Brússel, og tað sigur eisini seg sjálvt, at slík lyfti kann ein ES-nevndarlimur ikki geva einum parlamentarikara á einum óformligum fundi.

Man skal heldur ikki vænta, at ein ES-nevndarlimur yvir fyri fjølmiðlunum fer at vátta ella avsanna nakað um sínar metingar av einum úrsliti av møguligum samráðingum sum ikki eru byrjaðar. Hann hevur neyvan heldur nakra heimild til á nakran hátt at binda ES.

Men hóast Sjónvarpið roynir at spinna ríkiligt burturúr, er framvegis klettafast, at ES-nevndarlimurin, Olli Rehn, á óformligum fundi okkara millum er komin við - ikki lyftum - men greiðum ÁBENDINGUM um, at Føroyar kunnu gerast partur av ES við at brúka hitt sonevnda Álendska Modellið sum fyrimynd.

Á tann hátt ber til at fáa varandi undantøk fyri fiskivinnuni og umsitingini av fiskatilfeinginum. Men sjálvsagt skal hetta formliga staðfestast og góðkennast aftaná veruligar samráðingar.

Gjárdagurin segði nógv um summi. Politikarar komu kropp á kroppi fram at hildnum mikrofonum og søgdu, hvussu skaðiligt tað er at fáa nýggjar upplýsingar, sum í veruleikanum bert kunnu fjøltátta europapolitiska kjakið í Føroyum.

Er orsøkin ikki, at fólkafloksmenn og tjóðveldismenn eru bangnir fyri, at Føroya Fólk skal fáa eyguni upp fyri, hvat er best fyri land og fólk?

Teir kunnu ikki í álvara vera bangnir fyri, at Olli Rehn og eg einsamallir lima Føroyar inn í ES. Hvørgin av okkum hevur eitt slíkt mandat.

Mín einasta ætlan er at útvega flest møguligar upplýsingar um ES. Mín áskoðan er eisini at vit eiga at taka upp samráðingar við ES.

Og skuldi úrslitið av slíkum samáðingum endað við á leið tí, sum Olli Rehn og eg tosaðu um, so áttu vit at skipað fyri einari fólkaatkvøðu um úrslitið.

Eg eri sannførdur um, at tað er júst hetta, sum loysingarmenn ræðast verri enn hin versta sjálvan.

# Vit skulu bluffa og ikki vita!

HØGNI HOYDAL



**Var tað Tjóðveldi – ella stjórnarleiðari í øðrum landi – ið hevði lagt orð í munnin á einum ES-kommiseri, sum nú eru avdúkað sum ósannindi, hevði tað neyvan nakrantíð verið niðurafturlagt. Men man hetta hjá sambandinum ikki bara enda við onkrum tíðindum frá løgmanni um, at øll eru samd og at vit vilja alt í senn?**

Eftirhondini gerst meira og meira pínligt at eygleiða føroyskan politikk og føroyskar fjølmiðlar. BAC-samgongan er djúpt ósamd, hóast hon ongi politisk mál hevur. Kortini spæla flestu fjølmiðlar við í at skapa spjøldur og myndir um, at nú valdar semja og arbeiðslag, meðan tað sjálvsagt eru Tjóðveldi og ikki minst undirritaði, sum eru klandursvætti og ómøgulig.

Seinasti sjónleikurin hjá Løgmanni, Edmund Joenseni og Sambandsflokkinum er feskasta dømið um, hvussu veruleikin verður snaraður:

Løgmaður og sambandsflokkurin bjóða til tíðindafundar um "slóðbrótandi nýggja vitan", har tey boða alment frá, at Føroyar skulu gerast limur í ES sum partur av Danmark, og at EFTA kann als ikki brúkast.

Flokkurin, sum hevur leiðslu landsins boðar frá, at tey hava verið í sambandi við ein ES-kommisér, sum hevur sagt, at Føroyar fáa sertreytir og undantøk fyri fiskivinnu, og at tað als ikki fer at ávirka okkara rættarstøðu, at fara inn í danska ES-limaskapin.

Tjóðveldi og undirritaði gera alment vart við, og grundgeva fyri, at Edmund Joensen og Sambandsflokkurin føra privatan uttanríkispolitikk, undirgrava Løgtingið og skaða áhugamál og trúvirði føroyinga í samráðingum.

**Fjølmiðlafagnaður**
Í fjølmiðlunum verður undirritaði lýstur at vera "í øðini", og fær spurningar um, hvørt "eg ikki bara eri øvundsjúkur inn á Edmund Joensen". Hetta samsvarar jú so væl við følsku myndirnar, sum støðugt verða bygdar upp og endurtiknar.

Gjørdi mær enntá tann ómak at møta upp á tíðindafundi hjá løgmanni og Sambandsflokkinum, har eg gjørdi vart við, at tað ber ikki til at bluffa og leggja orð í munnin á teimum, sum vit skulu samráðast við. Eg heitti har eisini á fjølmiðlarnar um ikki at bera tíðindi, ið ikki vóru eftirkannað, tí hetta fór at gera løgmann og føroyskar myndugleikar til láturs og skaða okkum í altjóða samfelagnum.

Og úrslitið? - Bæði tey stóru bløðini rósa í oddagreinum framferð Edmund Joensens og Sambandsflokskins til skíggja. Dimmalætting leggur í oddagrein Tjóðveldi og undirritaða undir "politiskt spinn" í málinum. Og Sosialurin er fyrstur við "slóðbrótandi tíðindunum" frá "vælvitandi keldum" – og blaðið setur myndir og víðkaða oddagrein á breddan.

**Kringvarpið kritiskt**
Men Kringvarpið prógvar týdningin av, at hava kritiskar journalistar, sum eftirkanna tey, ið hava vald og skulu standa við sína ábyrgd.

Løgmaður og uttanríkisráðharrin fingu kritiskar spurningar í útvarpinum og roynt varð at halda teimum føstum í teimum politisku avleiðingunum av framferð sambandsfloksins. At løgmaður so svarar í eystur, tá spurt verður í vestur, er onnur søga. Útvarpið gjørdi eisini vart við, at løgmaður hevur sagt ósatt, tá hann knappliga boðar frá, at tað var als ikki Sambandsflokkurin, ið skipaði fyri tíðindafundi.

Sjónvarpið fór so eitt stig longur í journalistiska handverkinum. Tey fóru rætt og slætt til ta keldu, ið løgmaður og Sambandsflokkurin hildu tíðindafund um: nevniliga ES-kommisérin Olli Rehn.

Og av skrivstovu hansara varð upplýst, at hann als ikki hevði sagt tað, sum Føroya Løgmaður og Sambandsflokkurin hava hildið tíðindafund um, og roynt at billa Føroya fólki inn.

**Fær tað avleiðingar?**
Sostatt kunnu vit staðfesta: Føroya Løgmaður, Sambandsflokkurin og Edmund Joensen, hava bluffað føroysku fjølmiðlarnar og Føroya fólk – og tey hava drigið ein navngivnan ES-kommisér inn í sítt bluff við ósannindum.

Hetta skaðar allar Føroyar og okkara samráðingarmøguleikar frameftir.

Mær nýtist neyvan at nevna, at var talan um formannin í Tjóðveldi ella løgtingsfólk hjá Tjóðveldi, ið høvdu gjørt slíkt, so hevði tað ongantíð verið niðurafturlagt – og tað hevði fingið djúptøknar avleiðingar.

Mær nýtist neyvan heldur at at nevna, at var talan um ein forsætisráðharra og stjórnarberandi flokk í øðrum landi, ið vórðu avdúkað í slíkum, so var ikki ein forsíða turr.

Men vit hava jú fingið at vita í oddagreinunum hjá bæði Sosialinum og Dimmalætting – sum eisini hava endurgivið ósannindi og bluff sum stórtíðindi – at hetta er jú óført fyri Føroyar.

Og Dimmalætting hevur lagt undirritaða og Tjóðveldi undir politiskt spinn, sum forðar fyri veruligari viðgerð av okkara sáttmálaviðurskiftum við ES.

So man hetta ikki eisini bara aftir við borðinum? Og man samgongan ikki bara sleppa at siga, at øll eru samd og arbeiðslagið er gott? Tað er jú so nógv hugnaligari og ómakaleysari...

Hetta er í hvussu er einasta sannlíka forkláringin uppá, at ein løgmaður og ein løgmansflokkur halda seg kunna sleppa avstað við at gera slíkt.

**P.S.** Fyri ein ordans skyld skal eg gera vart við, at eg hvørki eri "í øðini, illur, skelkaður" ella nakað annað í hesum duri. Havi grundgivið gjølla fyri mínum sjónarmiðum í gjár og kann bara slåa fast, at tey vístu seg at verða prógvað í ólukkumát.

# Tjóðveldiskvinnur vandamiklar?

BERGTÓRA HØGNADÓTTIR JOENSEN



Suffaði inniliga, tá eg hoyrdi hugburðin hjá Jenis av Rana og Bill Justinussen í mun til tjóðveldiskvinnurnar á tingi. Siga, at vit eru skaðiligar fyri føroyska samfelagið, og at veljarin má ansa eftir, hvørjar kvinnur verða valdar á ting!!!!

Vænti, at tey flestu ynskja eitt løgting, sum umboðar kvinnur og menn í øllum aldrum, við ymiskum førleikum, búsitandi í øllum Føroyum. Eitt løgting, sum Føroya fólk kennir seg aftur í - eitt løgting eins fjølbroytt og føroyingar flest. Og so ikki at forgloyma eitt ment, mergjað og mentað løgting, har øll hava virðing fyri sjónarmiðunum hjá hvør øðrum – samd ella ósamd.

Við fjølbroytni gerst kjakið kraftmikið, og vit kunnu sum politikkarir verða sannførdir um, at øll sjónarmið hava verið lýst, tá avgerðin verður tikin.

Kanningar í Norðuratlantsbólkinum um, hví føroyingar velja at búseta seg í Danmark vístu millum annað, at mong velja Føroyar frá vegna konservatismu.

**Comfort zone**
Heini Zachariassen hevði áhugaverda framløgu á Vinnudegnum herfyri. Hann tosaði m.a. um "comfort zone". Greiddi frá, hvussu týdningarmikið tað er, at vit sum menniskju tora at seta okkum nýggj mørk og nýggjar avbjóðingar. Eisini segði hann, at um vit ikki royndu at arbeiða fyri, at "comfort zonan" vaks, ja so tørnaði hon alsamt. Hugsi, at Bill Justinussen og helst fleiri við honum kenna seg hóttar í síni "comfort zone" á tingi. Kanska hann og aðrir við honum heldur skuldu hugsað: "Áhugavert – vit eru ósamd, men sum tað er nógv meiri gevandi at kjakast, nú enn fleiri sjónarmið verða lýst!" Kanska fleiri høvdu hildið føroyska samfelagið verið litríkt og eggjandi at vent heim til, um hesin var hugburðurin.

Hoyrdi herfyri hollu Aslaug Gisladóttir siga, at kanningar vístu, at retorikkurin broyttist í norðurlendsku tingunum, tá kvinnuumboðanin fór upp um tey 30%. Við 5 kvinnum á tingi eru vit ikki í nánd av hesum prosenti. Haldi tó, at kvinnurnar - í øllum flokkum - eru meira sakligar enn flestu menn. Og klandursvættini havi eg higartil bert sæð millum menninar.

Eitt kann eg lova: Tjóðveldi rúmar fjølbroytni, og kvinnurnar í Tjóðveldi eru komnar fyri at verða! Ikki bert eitt "slag" av kvinnum, men rúmligar konur, mammur og ommur við alskyns førleikum og útbúgvingum. Allar, sum halda politikk vera áhugaverdan, og sum hava hug at gera sína ávirkan galdandi og sum royna at vísa tolsemi.

Tørvurin lýsir langan veg!